## Perez skoraði, tá PSV streyk til tops

Kenneth Perez stóð fyri síðsta málinum hjá PSV Eindhoven, tá hálandska stórfelagið, við einum ósvikaliga sikrum sigri uppá 4-1, yvirtók fyrsta pláss í Eresdivision. Dreymurin hjá Sparta, um at gera sensatiónina reyk sær ein túr, tá Danko Lazovic, í fyrsta minutti í dystinum, skoraði til 1-0. Mike Zonneveld og Jefferson Farfan syrgdu fyri hálvleiksstøðuni 3-0 til PSV, áðrenn Kenneth Perez, í øðrum hálvleiki, staðfesti sigurin. Stutt eftir at Perez skoraði, eydnaðist tað heimaliðnum at pynta uppá úrslitið, tá Sjaak Polak skoraði frá brotsparksblettinum.



## Nevaleikur kostaði 1.500 kr.

Venjarin hjá VB/Sumba, Predrag Prsic, varð í dag dømdur at gjalda 1.500 kr. í bót fyri tilburðin, tá hann tann 5. august Hans Paula Samuelsen hjá EB/Streymi nevan móti dystarenda. Ákærin kravdi 30 daga treytaleysa fongstulsrevsing, meðan verjin kravdi frídøming. Dómarin legði til grundar fyri úrskurðinum, at Predrag Prsic varð provokeraður, tá hendingin fór fram, og at hetta linkaði dómin. Hinvegin varð staføest, at ein nevi í sjálvum sær kemur undir harðskap, og varð talan tí ikki um frídøming.

# Summar og festivalur á talvborðinum

TALV

*Ólavur Simonsen*

**Annað umfar í liðkappingini í talvi varð telvað í vikuskiftinum. Oddaliðini gjørdu sína skyldu, og eisini vóru glottar at hóma í ódnarveðrinum í øðrum dystum**



*Festivalfyriskiparin og tónleikarin vísti seg sanniliga eisini sum telvara móti Olaf Berg*

### Klaksvík og Vestmanna halda kósina

Fyrsta liðið hjá Klaksvík fekk vitjan av øðrum liði hjá vestmenningum. Vestmenningar fluttu upp úr 2. deild í fjør og hava tí fyri fyrstu ferð tvey lið í 1. deild. Felagið hevur tó verið eitt sindur óheppið við fólki, tí tveir av ungu lyklaleikarunum, Jákup av R. Andreasen og Sjúrður Thorsteinsson, eru farnir niður í lestrarørindum. Hetta hevur øgiliga stóra ávirkan á styrkina á øðrum liði, sum bert hevur megnað at fingið eitt stig í tveimum dystum.

Klaksvíkingar vunnu dystin 4 – 0, hóast talvini ikki vóru so avgerandi, sum úrslitið talar fyri.

Vestmanna 1 manglar tó ikki góðar telvarar. Teir hava nevniliga styrkt liðið við hvalvíkinginum Martin Brekká, eftir at felagsliðið við streymin fór í upploysn í fjør. Uppgerðin á fyrsta borði varð ein endurtøka av finaluni um føroyameistaraheitið fyri einstaklingar, har John Rødgaard aftur sigraði á Martini Poulsen og førdi liðið til ein 4 – 0 sigur á einum kreppuraktum havnarliði.

Triðji dysturin í 1. deild endaði javnur 2 – 2 millum Klaksvík 2 og Sandavág.

**Berg, Olaf - Rasmussen, Steintór [B01]**
**FM-lið 1. deild (2. umfar), 28.10.2007**
1.e4 d5 2.e5 c5 3.d4 cxd4 4.Qxd4 Nc6 5.Bb5 e6 6.Bd2 Bd7 7.Bxc6 bxc6 8.c4 c5 9.Qc3 d4 10.Qf3 Rb8 Mongu frúgvaleikirnir hjá hvítum hava havt við sær, at svartur longu hevur greiðan fyrimun 11.b3 Ne7 12.Qe2 Bc6 13.f3 Nf5 14.Nh3 d3 15.Qf2 Nd4 16.Na3 Ne2 Tað leikar hart á framman fyri konginum hjá Olafi 17.Kf1 Be7 18.Nf4 Nxf4 19.Bxf4 Qa5 Steintór heldur fast um fyrimunin 20.Qb2 0–0 21.Rd1 Rbd8 22.Kf2 f6 23.Bd2 Qc7 24.Bc3 fxe5 25.Bxe5 Qb7 Hvítur hevur nú ongan góðan leik 26.Qc1 Bh4+ 27.Kg1

### Høvuðsstaðurin í trupulleikum

Havnin, ið hevur fostrað nógvar av bestu telvarunum í Føroyum, hevur bert megnað at fingið eitt stig og liggur á niðurflytingarplássinum í 1. deild. Fleiri av elitutelvarunum hjá Havnini telva við øðrum feløgum ella telva ikki við. Hví so er, eru fleiri telvarar á einum máli um, at Havnar Telvingarfelag hevur havt eitt sera óvirkið felagsumhvørvi tey seinastu árini, og tí eru telvarar farnir í onnur feløg, ella hava teir valt ikki at luttaka.

Hendur tað, at Havnin flytur niður í 2. deild, verður hetta ein dyggur smeitur fyri føroyska telving.

### Steintór prýður um lívsmyndina

Eftir avboð í síðstu løtu vóru boð send eftir Steintóri Rasmussen at telva við á øðrum liði hjá Klaksvíkar Talvfelag. Steintór hevur eina drúgva talvkarrieru á baki og vann føroyameistaraheitið fyri einstaklingar í 1990. Í vikuskiftinum telvaði hann móti Olafi Berg í húsinum við Vágsbøð, har pallurin hesaferð vóru teir 64 puntarnir. Steintór megnaði aftur væl at samskipa fólkið í ódnarveðrinum, og tyktist at hava fingið íblástur frá sanginum hjá Scorpions "Rock you like a hurricane", sum varð spældur bert fáa metrar frá talvhúsinum seinasta Summarfestival.

Eins og Scorpions endaði Steintór talvið við einum braki, har glottin í ódnarveðrinum var eitt bispaoffur sum gjørdist avgerandi. Ein sonn perla, sum er endurgivin í blaðnum.

27. … Bxf3! 28.gxf3 Qxf3 29.Qd2 Bf2+ Eftir 30. Kf1 verður hvítur settur mát við 30. ... Fh3# 0–1

**Støðurnar í ymsu deildunum eftir 2. umfar eru:**

| 1. deild | Stig |
|---|---|
| Klaksvík 1 | 8 |
| Vestmanna 1 | 7 |
| Sandavágur | 5 |
| Klaksvík 2 | 2 |
| Vestmanna 2 | 1 |
| Havnin | 1 |

| 2. deild | |
|---|---|
| Klaksvík 3 | 5½ |
| Havnin 3 | 5 |
| Kollafjørður | 4½ |
| Havnin 2 | 3½ |
| Toftir | 3 |
| Sandavágur 2 | 2½ |

| 3. deild A | |
|---|---|
| Skopun | 4½ |
| Sandavágur 3 | 3½ |
| Vestmanna 3 | 2 |
| Klaksvík 4 | 2 |

| 3. deild B | |
|---|---|
| Havnin 4 | 5½ |
| Gøta | 4 |
| Rókur | 3½ |
| Vestmanna 4 | 3 |

| Unglingar | |
|---|---|
| Klaksvík | 5 |
| Havnin | 4 |
| Rókur | 3 |
| Vestmanna | 3 |
| Sandavágur | 3 |
| Skopun | 2 |



# Borgin varð herjað, og bronsan heima



*Herborg megnaði at fáa bronsu í NM fyri kvinnur*

ÓLAVUR SIMONSEN

**Fremsti føroyski kvinnuligi telvarin, Herborg Hansen, gjørdi enn eitt megnar avrik í kapping um norðurlandameistaraheitið**

**Fyrsta føroyska heiðursmerkið í NM fyri kvinnur**
Herborg Hansen, sum er føroyska ímyndin fyri kvinnutelving, megnaði at fáa bronsuna til høldar, eftir at hon hevði verið uppi á fyrsta plássi og vent í 3. umfari.

Norðurlandameistarakapping í talvi fyri kvinnur varð avgreidd í Danmark í vikuskiftinum. Herborg Hansen, ið vann DM fyri gentur fyri tveimum árum síðan, var føroyska umboðið í bólkinum fyri kvinnur undir 20 ár.

Herborg fekk 3½ stig av 5 møguligum, har hon tapti móti donsku Louise Højen. Eisini telvaði hon javnt móti Ellen Øen Carlsen, ið er systir unga stórmeistarin Magnus Carlsen. Magnus er styrkismettur nummar 16 á heimslistanum, so Ellen hevur nokk fingið góða venjing frá navnframa beiggjanum.

Sjálvt um føroysku kvinnurnar, ið telva, eru fáar, hevur Herborg enn einaferð víst, at føroysk kvinnutelving er millum fremstu í norðurlondum.

Hin luttakarin, ið umboðaði Føroyar í bólkinum U13, var Sára T. Olsen. Sára fekk 1½ stig, sum gav eitt 11. pláss.